# Túrfrágreiðing

## Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka

## 5.– 12. september 2007

*Cruise report: Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*

*5-12 September 2007*

Eyðfinn Magnussen



NVD*Rit* 2007:11

SERRITGERÐ
Thesis

TØKNIFRÁGREIÐING
Technical Report

UNDIRVÍSINGARTILFAR
Teaching Material

UPPRIT
Notes

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN
Faculty of Science and Technology

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
University of the Faroe Islands

*Heiti / Title* ***Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka***

**5.- 12. september 2007**

*Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*

*5-12th September 2007*

Høvundur / Author **Eyðfinn Magnussen**

Ritslag / Report Type Tøknifrágreiðing/Technical Report

***NVD*Rit** 2007:11

© Náttúruvísindadeildin og høvundurin

Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya

Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)

Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)

☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

**Samandráttur**

Tað er framvegis lítið til av toski á Bankanum. Nøgdin av hýsu minkar eisini áhaldandi og miðalveiðan av upsa er einans ein sekstanda part av tí hon var í 2003.

Hetta er høvuðsboðskapurin í úrslitunum frá seinastu yvirlitstrolingini, sum Magnus Heinason gjørdi á Føroyabanka í døgunum 6. -10. september í ár. Tilsamans varð trolað á 29 ymiskum støðum á Bankanum. Í hesum tóvunum vórðu fingnir einans 147 toskar tilsamans. Tá hugt verður at miðalveiðuni, vísa úrslitini tó, at veiðan av toski vaks 15 % í vekt samanborið við í fjør, men samanborið við onnur ár, er veiðan av toski tó framvegis lág, einans 10 % av tí hon var í 2002.

Nøgdin av hýsu minkar framvegis. Miðalveiðan av hýsu hendan túrin var 92 kg pr. fiskitíma, móti 100 kg árið fyri. Hetta er ein minking uppá 8 %, samanborið við 2006 og einans 40% av veiðuni í 2005. Samlaða veiðan av upsa var 575 kg, sum svarar til 20 kg fyri hvønn fiskitíma. Hetta er 57 % minni enn upsaveiðan í 2006 og einans 6 % av upsaveiðuni í 2003.

Hóast minkingar í nøgd, er fiskurin tó rímiliga væl fyri. Hetta sæst, tá hugt verður at konditiónsfaktorinum. Konditiónsfaktorurin er eitt lutfall í millum vekt og longdina á fiskinum, og sigur okkum, hvussu feitur fiskurin er. Hægri hetta talið er, feitari er fiskurin. Miðalkonditíónsfaktorurin fyri tosk, hýsu og upsa hendan túrin var á leið tað sama sum í fjør.

-----------------------------------------------------------------

**Fólk frá FRS:** Regin Kristiansen, Eydna í Homrun og Hallur Joensen.
**Fólk frá Fróðskaparsetrinum:** Eyðfinn Magnussen.
**Onnur**: Arni Petersen, Havsbrún.

**Ábyrgd:** Eyðfinn Magnussen, Fróðskaparsetur Føroya.

**Endamál**: Hetta var tann triði og seinasti túrurin av heyst-yvirlitstrolingunum í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Vekt, tal og longdarbýti varð skrásett fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd á túrinum. Eisini vóru gjørdar magakanningar av toski, hýsu og upsa. Umframt at fiska, vóru mátingar eisini gjørdar av salti, hita og plankton á Bankanum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum og við vanligum grunni. Breitlarnir vóru 60 m og 120 m, Steinhamns lemmar, Seastar og hitamátari, Sea-Bird CTD og WP2 glúpur.

**Um túrin:** Farið varð av Havnini 5. september kl. 18.00. Á veg út á Bankan varð Temistor ketan koyrd út og togað aftaná skipinum. Trolið var koyrt út fyrstu ferð 6. september kl. 06.40. Seinasta CTD-støðin varð tikin 11. september kl. 12.25. Alla støðir vórðu tiknar. Í sýnishondbókini verður miðað eftir at taka tilsamans 1200 nytrur av toski, hýsu og upsa; 400 av hvørjum. Av tí at ov lítið var at fáa, var hetta bert møguligt fyri hýsu. Av toski vórðu tiknar 147 nytrur og av upsa 155 nytrur.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Magarnir vórðu kannaðir umborð. Hitamátingarnar á trolinum og úrslitini frá Imponatorskipanini eru liðug rættað og løgd í databasuna.

## Fyribilsúrslit

| FISKANAVN | Samlað veiða (kg) | | | Tal av prøvum | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2006 | 2007 | Munur (%) | Stak vektir | Longdar mátað | Nytrur | Magar |
| HÝSA | 2886 | 2661 | -8 | 1975 | 2005 | 448 | 100 |
| GULLLAKSUR | 654 | 1574 | 141 | 247 | 247 | 70 | |
| HAVMÚS | 1840 | 1368 | -26 | 140 | 141 | | |
| LOLIGO | 314 | 1307 | 316 | 553 | 727 | | |
| TOSKUR | 596 | 687 | 15 | 147 | 147 | 147 | 66 |
| UPSI | 1322 | 575 | -57 | 259 | 259 | 155 | 47 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 79 | 315 | 298 | 363 | 377 | | |
| KJAFTSVARTI KONGAF. | 211 | 226 | 7 | 109 | 112 | | |
| SVARTKJAFTUR | 125 | 142 | 14 | 128 | 132 | | |
| LONGA | 75 | 99 | 32 | 25 | 25 | | |
| SEKTTÁKNUHÁVUR | 0 | 96 | | 1 | 1 | | |
| SVARTFISKUR | 0 | 87 | | 14 | 14 | | |
| GLÝSUFISKUR | 26 | 73 | 182 | 270 | 611 | | |
| TUNGA | 16 | 35 | 116 | 44 | 44 | | |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 0 | 33 | | 18 | 20 | | |
| HAVTASKA | 5 | 30 | 491 | 4 | 4 | 3 | |
| BLÁLONGA | 23 | 24 | 5 | 8 | 8 | | |
| STÓRI KONGAFISKUR | 45 | 18 | -60 | 11 | 11 | | |
| STINGLAKSUR | 0 | 14 | | 2 | 2 | | |
| LÁLLA | 47 | 14 | -71 | 5 | 5 | | |
| KALVI | 4 | 12 | 200 | 4 | 4 | | |
| TRANTKONGAFISKUR | 0 | 11 | | 12 | 12 | | |
| KNURRHANI | 5 | 7 | 35 | 26 | 26 | | |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 6 | 0 | | | | | |
| SILVURMURTUR | 6 | 5 | -18 | 26 | 27 | | |
| SANDSPRØKA | 8 | 5 | -39 | 10 | 10 | | |
| KIKARAFISKUR | 0.5 | 5 | 844 | 2 | 2 | | |
| BROSMA | 10 | 4 | -56 | 4 | 4 | | |
| REYÐSPRØKA | 0 | 3 | | 5 | 5 | | |
| HVASSHVOYSA | 0 | 3 | | 1 | 1 | | |
| TRANT LANGASPORL | 0 | 3 | | 2 | 2 | | |
| LÝSINGUR | 0 | 3 | | 1 | 1 | | |
| KLINGRUSKØTA | 0.8 | 2 | 187 | 1 | 1 | | |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 7 | 2 | -76 | 10 | 10 | | |
| ROSSAMAKRELUR | 0 | 2 | | 4 | 4 | | |
| BLÁRIDDARI | 2 | 0.7 | -67 | 1 | 1 | | |
| SKRUBBA | 0 | 0.6 | | 2 | 2 | | |
| GLASKVOYSA | 2 | 0.19 | -91 | 1 | 1 | | |
| NEBBASILD | 0 | 0.02 | | 1 | 1 | | |
| HUMMARI | 0.6 | 0 | | 0 | 0 | | |
| JÁKUPSSKEL | 0.1 | 0 | | 0 | 0 | | |
| SJÓPRÓNUR | 0.01 | 0 | | 0 | 0 | | |
| **Tilsamans** | **8.317** | **9.443** | **14** | **4.435** | **5.005** | **700** | **213** |

***Talva 1:*** *Samlaða veiðan á Føroyabankatúrinum 6.-10. september 2007. Eisini verður samanborið við veiðuna heysttúrin 2006.*

**Fiskasløg:** Fingin vórðu íalt 38 ymisk fiskasløg á túrinum (*Talva 1*). Hetta eru 8 sløg fleiri enn á heystið 2006, tá vit fingu 30 ymisk fiskasløg. Í 2005 vórðu eisini fingin 38 fiskasløg. Talið av fiskasløgum, sum verða fingin á yvirlitstrolingunum á Bankanum, er vanliga rættiliga støðugt; 33 til 34 ymisk sløg.

**Veiðan:** Samlaða veiðan hendan túrin var 9.443 kg. Hetta er 14 % meira enn fyri einum ári síðani, tá samlaða veiðan var 8.317 kg (*Talva 1*) men einans 51% av samlaðu veiðuni í 2005. Veiðan av flestu fiskasløgunum var hægri henda túrin enn í fjør: Av teimum 38 fiskasløgunum, sum vórðu fingin á túrinum, var veiðan hægri fyri 27 av sløgunum. Fyri 11 av fiskasløgunum varð minni fingið hendan túrin, samanborið við heysttúrin í fjør (hýsu, havmús, upsa, stóra kongafiski, lállu, silvurmurti, sandsprøku, brosmu, hvítingsbróðri, bláriddara, glashvoysu). Á *myndunum 1 – 6* verður greitt frá veiðuni av toski, hýsu og upsa, og hvussu væl í holdum hesi fiskasløgini vóru.

**Toskur:** Tilsamans vóru fingin 687 kg (147 fiskar), av toski á Føroyabanka hendan túrin móti 596 kg (163 toskar) í 2006. Hetta er ein øking av veiðuni í vekt uppá 15 % samanborið við í fjør, hóast 16 færri toskar vóru fingnir. *Mynd 1* vísir miðalkonditiónsfaktorin á toskinum. Konditiónsfaktorurin sigur okkum, hvussu feitur fiskurin er. Miðalkonditiónsfaktorurin hendan túrin var 1,02, sum er á leið tað sama sum í fjør, tá konditiónsfaktorurin var 1,03. Á *mynd 2* er víst miðalveiðan av toski í heyst-yvirlitstrolingunum á Føroyabanka árini 1991 og frameftir. Hendan túrin var miðalveiðan 24 kg pr. fiskitíma. Hetta eru 15 % hægri enn árið fyri, tá veiðan var 21 kg pr. fiskitíma. Samanborið við onnur ár var veiðan tó lág. Í 2002 var miðalveiðan 249 kg pr. fiskitíma.

**Hýsa:** Í alt vórðu fingin 2.661 kg av hýsu (*Talva 1*). Hetta er ein minking upp á 8 % samanborið við árið fyri. Miðalkonditiónsfaktorurin fyri samlaðu hýsuna var 1,02. Hetta er 2 % lægri enn í fjør (*Mynd 4*). Á *mynd 3* er víst miðal veiða av hýsu, fingin á heyst-yvirlitstrolingini síðani 1991. Her sæst, at veiðan øll árini hevur verið í støðugum vøkstri fram til 2002, tá veiðan var 1210 kg pr. fiskitíma. Men eftir hetta er veiðan minkað. Soleiðis var eisini í ár. Miðalveiðan av hýsu hendan túrin var einans 92 kg pr. fiskitíma, móti 100 kg í 2006. Hetta er ein minking uppá 8 %, samanborið við 2006 og einans 40% av veiðuni í 2005.

**Upsi:** Samlaða veiðan av upsa var 575 kg (*Talva1*). Hetta er 57 % minni samanborið við upsaveiðuna í fjør. Miðalkonditiónsfaktorurin á upsanum var 0,93. Hetta er á leið tað sama sum í fjør. Á *mynd 6* er víst miðalveiðan av upsa á heyst-yvirlitstrolingunum á Føroyabanka frá árunum 1991 og frameftir. Hendan túrin var miðalveiðan 20 kg pr. tóv, samanborið við 46 20 kg pr. tóv fyri einum ári síðani




***Mynd 1**: Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá toski á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1992-2007.*




***Mynd 2**: Miðalveiðan av toski (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991-2007.*

# Hýsa




***Mynd 3**: Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá hýsu á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1996-2007.*




***Mynd 4**: Miðalveiðan av hýsu (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991–2007.*

# Upsi




***Mynd 5**: Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá upsa á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1996 til 2007.*




***Mynd 6**: Miðalveiðan av upsa (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991-2007.*

**Magakanningar**
**Toskur**: 66 toskamagar vórðu kannaðir. Høvuðsføðin hjá toski vóru krabbadýr (ymsir krabbar, gággukrabbar og Galathea/Munida). Best umboðaðu fiskarnir vóru flatfiskar. Nakað av hægguslokki var eisini. Eingin nebbasild var funnin í magunum. Mest vanliga føðin hjá toskinum á Bankanum plagar annars at vera nebbasild og høgguslokkur.

**Hýsa**: 100 hýsumagar vórðu kannaðir. Føðin hjá hýsuni var ein blandingur av slangustjørnum, skeljum, bustmaðkum, gággukrabbum og Galathea/Munida.

**Upsi**: 47 upsamagar vórðu kannaðir. Vanligast føðin hjá upsanum var laksasild, krill og veingjapíkur.

Tórshavn 26. oktober 2007

Eyðfinn Magnussen_____________________